STARVSLÝSING



## Avloysarastarv á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni

Søkt verður eftir umhvørvisviðgera, til tíðaravmarkað starv, á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Starvið umfatar yvirhøvur mál innan karmarnar av umhvørvisverndarlóggávuni, serliga innan viðgerð av umhvørvisgóðkenningum.

Hetta merkir, at tú í tí dagliga kemur at arbeiða við at:

- gera uppskot til umhvørvisgóðkenningar
- røkja umhvørviseftirlit
- gera umhvørvisfakligar metingar
- fylgja við í altjóða gongdini innan umhvørvisvernd.

Starvið er sera fjølbroytt og er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Skikkað til starvið eru tey, sum hava lokið prógv innan umhvørvistøkni, náttúruvísund, verkfrøði e.l.

Vit sóknast eftir einum fólki við áræði og framfýsni at náa settum málum, sum sær nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing, kann arbeiða sjálvstøðugt, dugur væl at samstarva, hevur kunnleika til edvskipanir og hevur góð evni til at samskifta við onnur, bæði í skrift og talu. Koyrikort til bil er ein treyt.

Starvið skal setast skjótast tilber, og er setanin tíðaravmarkað til 31. desember 2007. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

Umsóknir við avriti av prógvi, viðmælum, CV og tílíkum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 16. juli 2007.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóhonnu Olsen, virkandi deildarleiðara, tlf. 35 64 22, ella Bárð Enni, stjóra, tfl. 35 64 00.

Lýsingin er eisini at síggja á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

VASTI 4590010

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

---

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Umlættingina á Garðavegi 38, Klaksvík

Eitt tíðaravmarkað starv er leyst at søkja í tíðarskeiðnum frá 1. august 2007 til 31. desember 2007.

Tey, sum brúka umlættingina, hava eina fasta skipan. Til umlættingina koma ung og børn við sjúkugreiningini autisma. Tí er ynskiligt, at viðkomandi hevur vitan innan hetta økið. Arbeiðið fevnir millum annað um at skipa gerandisdagin og frítíðina saman við teimum ungu, børnunum og verandi starvsfólkum. Dentur verður lagdur á, at tann, ið sett/ur verður, er likamliga væl fyri, er áhugað/ur at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi dag-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir.

Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils í Umlættingini á Garðavegi.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran tlf. 456320 ella 258679.

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Umlættingin á Garðavegi 38
700 Klaksvík
Stílað: Asta Poulsen, leiðari

**Umsóknarfreist: 18. juli 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

Sosialurin
www.sosialurin.fo

---

# Teknikkari

**Søkt verður eftir teknikara at byrja skjótast gjørligt.**

**Førleikakrøv:**
Fyrimunur er um umsøkjarin er útbúgvin radiomekanikari, radioteknikkari ella hevur líknandi royndir.
Hevur kunnleika til teldur og net.
Kann arbeiða sjálvstøðugt.
Koyrikort er ein treyt.

**Arbeiðið umfatar:**
Uppsetan og tænastuveitan av:
Navigatións-, fiskileiti- og samskiftisútgerð og fylgisveinatænastur til skip.

Víkmar
Vestara Bryggja · Postsmoga 3033
110 Tórshavn · Tel. 352182 · info@vikmar.fo
www.vikmar.fo

---

# Ársaðalfundur

**Ársaðalfundur hjá Ognarhaganum í Kvívík verður í Glæmuni mikudagin 18. juli 2007, klokkan 19.00, við hesi dagsskrá:**

1. Ársroknskapurin fyri 2006
2. Nýtt Ognarhús »Yviri í Gerði«
3. Útstykking »Frammi í Gerði« og »Frammi í Forna«
4. Ymiskt

**Nevndin fyri Ognarhagan í Kvívík**

---

ROYN

# Bingo

**Gott bingo verður í Royn høllini í Hvalba 3. juli kl. 19.30. Burturlutað verður flogferð við Atlantsflog o.a. spennandi. Eykaspøl.**

**Bóltfelagið Royn**